


**FISKAKEYP**

*Nógvur fiskur kemur upp á land, og prísurin er eisini góður í løtuni*

# Óførur fiskaprísur

**Noreg:** Prísurin fyri tann stóra toskin er í dag á sama stigi sum undan fíggjarkreppuni, vísa tøl úr Noregi.

Sambært norska blaðnum Andøyposten merkja útróðrarmenn á Andenes nú til kapping fyri teirra veiðu frá fiskakeyparunum í landi. Í dag ber soleiðis til at fáa 21,50 norskar krónur – svarandi til 20,50 føroyskar krónur – fyri kilo av tí størsta toskinum.

Sagt verður, at tveir av fiskakeyparunum nú vilja gjalda fýra krónur yvir minstaprísin.

Tann næststørsti toskurin hevur eisini góðan prís. Hann er hækkaður nógv í seinastuni, og liggur nú á 19 norskum krónum fyri kilo, ímóti 17 krónum áður.

– Tað verður eisini boðað frá lodnu í fiskinum, og so kann meiri enn so henda, at prísurin fer at lækka aftur um stutta tíð, sigur Rolf Røsnes hjá Framnes Fiskeindustri, sum í vetur lat 19 krónur fyri kilo av tí stóra toskinum.

Hans Erik Olsen frá Andenes Fiskemottak váttar fyri blaðnum, at teirra prísur hevur verið hækkandi í seinastuni, heilt til 21,50 krónur fyrr í hesum mánaðinum.

– Vit kunnu staðfesta, at vit hava goldið ein yvirprís fyri toskin. Men orsøkina til hækkingina hava vit gjørt fyri at fáa útróðrarmenninar at koma við størri og betri fiski, sigur Hans Erik Olsen.

*snorri@sosialurin.fo*

# Nýggj verkætlan í fiskivinnuni

**Danmark:** Stórar vónir verða settar eini fiskivinnuætlan í Norðurjyllandi, har endamálið er at tryggja nýggj arbeiðspláss og betri góðsku.

Tað er Nordsøen Forskerpark í Hirtshals sum skal gera sítt til, at uppisjóvarfiskurin verður gagnnýttur betri. Gongst sum ætlað, kunnu skapast 25 nýggj arbeiðspláss og 10 nýggjar fyritøkur síggja dagsins ljós.

Hugskotið er at framleiða olju úr slógvi og øðrum, og sum í dag endar sum fiskamjøl, minkafóður ella biogass. Í somu atløgu er ætlanin at menna toskarhøvd ið skulu útflytast til Asien.

Danski búskapar- og vinnulívsráðharrin, Brian Mikkelsen letur



eisini væl at ætlanini í Hirtshals, ið er mett at kosta góðar 12 mió krónur.

– Nógvar smærri og miðalstórar fyritøkur mangla ofta bæði tíð og pening til at arbeiða málrættaði við nýhugsan. Nú verða skaptir møguleikar at stuðla eini ætlan ið fer at skapa vøkstur, samstundis sum vit fáa ábendingar um útlitini fyri at skapa nýggjar framleiðslur, sigur hann.

*snorri@sosialurin.fo*

**GRANSKA**

*Granskaraparkin í Hirtshals fer at fáa stóran týdning fyri fiskivinnuna á sjógvi og landi*

# Stórur tørvur á navigatørum

**Noreg:** Stóri tørvurin á navigatørum umborð á norskum bátum, kann í ringasta føri hava við sær, at skip ikki kunnu loysa frá landi.

Ein kanning, sum Norges Fiskerlag hevur gjørt vísir, at tørvur er á fólki á brúnni á minst 260 skipum, framvið allari norsku sjóvarstrondini.

Serliga í teimum norðastu fylkjunum er støðan álvarsom, har ein í trimum teirra hevur tørv á minst 150 skiparum og stýrimonnum.

Ein orsøk til henda trupulleikan er ein nýggj reglugerð í Skipssikkerhetsloven. Her verður gjørt greitt, at tað skulu verða minst tveir navigatørar umborð á einum skipi sum er í vinnu í meiri enn 14 samanhangandi tímar á einum túri.

Norska sjóverjan er longu byrjað at hava eftirlit sambært hesi reglugerðini, m.a. hjá rækjutrolarum í Norðsjónum. Her er støðan hon, at teir eru illa fyri fíggjarliga og tí royna at spinka og spara, har tað yvirhøvur ber til.

Hinvegin er einki skip tikið fyri brot á hesa reglugerðina. Ein roynir ístaðin at spyrja seg fyri og vísa á endamálið og tørvin á navigatørum við prógvi.

Fiskarlaget hevur tikið málið upp við Sjøfartsstyrelsen og ynskir eina skipan, har ein so líðandi gevur fólki høvið at endurbúgva seg ella fáa aðrar navigatørar umborð.

Avgerð er haraftrat tikin um, at Fiskarlaget kemur við eini ætlan um tiltøk, soleiðis at fleiri navigatørar kunnu útbúgvast sum skjótast.

*snorri@sosialurin.fo*